Jóannes Eidesgaard, løgmaður:

# Brúkar Skemtbøkurnar sum uppslagsverk

**Løgmaður var avbera glaður fyri jólagávuna frá Óla P og stúrdi ikki fyri at verða mintur á løtur, har Óli kanska hevur gingið løgmanni nakað nær**

JÓLAGÁVA
*Anna Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Jóannes Eidesgaard, løgmaður fekk nýggjastu Skemtbókina frá teknaranum Óla P.*

*Mynd Jan Müller*

– Eg haldi ikki, eg nakrantíð eri vorðin so fornermaður av nakari tekning hjá Óla, at eg ikki dugi at síggja tað stuttliga í henni. Og skuldi tað hent, hevði tað bara verið eitt tekin um, hvussu beint Óli hevur rakt, sigur løgmaður, sum avdúkar at hann hevur allar Skemtbøkurnar standandi bæði á skrivstovuni og heima í stovuni.

– Tað hevur verið ómetaliga stuttligt at fylgja við Óla øll hesi árini, og tað er ongin ivi um, at hann hevur ment seg nógv sum teknari. Í fyrstuni var tað mest tekningina í sær sær sjálvum, tú legði merki til. Síðani byrjaðu ymsir smálutir at koma til sjóndar, sum tú sjáldan varnaðist beinanvegin, men sum gjørdu tekningina uppaftur forvitnisligari, tí tað er ofta har, tað serliga beinrakna situr. Og seinnu árini má eg siga, at Óli er vorðin ein sannur meistari í at brúka síni sermerktu orðaspøl sum eitt eyka krydd, bæði til tað stuttliga, men sanniliga eisini fyri at snara evnunum eitt hakk longur tann speiska vegin.

Løgmaður heldur eisini, at tað er fínt at Óli ikki aftar seg við at lata síni egnu sjónarmið skína ígjøgnum onkuntíð, tí tað vísir bara, at tað er eitt menniskja við eini sterkari persónligheit, sum situr og teknar.

– Óli tvíheldur um sítt listarliga frælsi, og tað havi eg stóra virðing fyri. Men hann leggur ongantíð eftir fólki fyri at hanga tey út persónliga. Heldur ikki, tá hann sleppir at gera tað, hann dugir serliga væl, nevniliga at avdúka politikarar, sum royna at fáa okkurt at síggja út, sum nakað annað, enn tað í veruleikanum er.

Jóannes er vísur í, at politiski gerandisdagurin í Føroyum hevði verið munandi fátækari, um vit ikki høvdu tekningarnar hjá Óla á baksíðuni á Sosialinum at gruna yvir og stuttleika okkum við.

– Og lat meg nevna eitt afturat. Eg havi lagt til merkis, at tá eg siti og blaði í Skemtbókunum, kemur tað meir enn so fyri, at eg verði mintur á onkra hending, eg mest sum hevði gloymt. Nú bøkurnar eru so nógvar í tali, eru tær vorðnar eitt heilt uppslagsverk, sum ikki bara dagfestir hendingar, men eisini endurskapar allan stemmningin, sum var rundan um tær – og tað má sigast at vera rættiliga sermerkt, heldur løgmaður.

Edmund Joensen, løgtingsformaður:

# Ber ikki til at krógva seg fyri Óla P

**-Tá Skemtbøkurnar hjá Óla P einaferð í framtíðini koma undir hamaran, verður tað heilt vist onkur, sum fer at stinga hondina ógvuliga djúpt niður í lumman, væntar Edmund Joensen, løgtingsformaður**

JÓLAGÁVA
*Anna Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Edmund Joensen fær handaða nýggjastu Skemtbókina í snotuligu og hugnaligur hølunum á Løgtingsskrivstovuni*

*Mynd Jan Múller*

Edmund Joensen, løgtingsformaður sat so hugagóður og smáflenti, tá vit ringdu at spyrja, hvat hann helt um jólagávuna, hann hevði fingið frá Óla P.

- Tú, eg siti beint nú og lúri í hana. Eitt tað stuttligasta er at sita fyri seg sjálvan við tekningunum og gruna yvir, hvussu tað ber til, at Óli mest sum altíð er langt frammanfyri politikarnar. Hann er vorðin ein sannur meistari í at avdúka sovorðið, sum politikarnir vóru púra vísir í, at ongin annar hevði lagt merki til. Tað man eftirhondini vera gingið upp fyri teimum flestu, at tað also ikki ber til at krógva seg fyri Óla P.

– Tað sermerkta við hansara tekningum er eisini, at tær altíð fara beint inn í kjarnina á einum máli, sum politikarar hava vavt í og rundan um í vikur og ofta mánaðir. Tað munnu vera fleiri við mær, sum fyrst fara eftir tekningini hjá Óla, tá tey fáa Sosialin upp í hondina, men eg má viðganga, at eg eisini geri tað, fyri at síggja hvat úrslit Óli er komin til í onkrum politiskum máli, tí tað rakar sjáldan við síðuna av.

Edmund hevur ongantíð ivast í, at tað býr ein ógvuliga rámandi politiskur analytikari aftanfyri einfaldu strikurnar hjá Óla – eitt kynstur, teknarin bara er vorðin kringari í við árunum. So tað er ikki bara tað, at tekningarnar eru stuttligar. Sum politiskar viðmerkingar eru tær eisini á sera høgum støði, heldur Edmund.

– So eg eri eisini rættiliga errin av at eiga hesi signeraðu eintøkini av Skemtbókunum. Tað verði ikki eg, sum fari at koyra tær á uppboðssølu, men tá tær einaferð í framtíðini koma undir hamaran, verður tað heilt vist onkur, sum fer at stinga hondina ógvuliga djúpt niður í lumman, væntar Edmund Joensen.

## Jólagávan frá Óla P

Sum vanligur siður hevur verið øll hesi árini Sosialurin hevur givið út tekningarnar hjá Óla P í bók, so fingu landsins hægst kosnu menn eisini hesaferð »Skemt« i jólagávu. Teknarin vitjaði í Tinganesi og á løgtingsskrivstovuni, har ávikavist Jóannes Eidesgaard, løgmaður og Edmund Joensen, tingformaður fingu seinastu bókina í Skemt-røðini í jólagávu. Hetta er tann 16. bókin í hesi røð.